

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Atlantic Petroleum hevur funnið gass í norskum sjógvi

**Jógvan Hugo Gardar**

13.04.2015 - 07:46

Oljan.fo

Atlantic Petroleum boðar í morgun frá at Statoil sum fyristøðufelag er við at stongja royndarboringina í einum kanningarbrunni 12 kilometrar vestanfyri Aasta Hansteen norðarlaga á Norðhavinum. Hetta er sokallaða Roald Rygg-økið.

Borurin rakti við gass, og fyribils kanningar vísa at talan er um ein brunn sum hevur millum tvær og sjey milliardir rúmmetrar av gassi, sum møguligt er at framleiða.

Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum sigur at tey eru nøgd við úrslitið, og at hesin brunnurin helst verður knýttur til sjálva Aasta Hansteen-framleiðsluna.

Gass er eisini funnið í einum grannaøki, Snefrid Nord, og tað ger at helst verða hetta og Roald Rygg knýtt saman við Aasta Hansteen.

Tað er Statoil sum er fyristøðufelag fyri Roald Rygg-samtakinum við 42,5 prosentum av loyvinum, meðan Centrica eigur 20 prosent, petoro 20 prosent, Wintershall tíggju prosent og Atlantic Petroleum 7,5 prosent.